## Føðingardagsheilsan til

# Jacob Mýri á 65 ára degnum



Góði Gakki, hjartaliga tillukku við degnum. Tá eg hugsi um teg, eri tað nógv góð minnir, ið renna fram fyri meg. Nógvar hugnaligar, stuttligar og álvarsamar løtur hava vit havt saman. Hetta vil eg nýta høvið, at takkað tær so inniliga fyri.

Tú vaks upp hjá ommuni og abbanum, har eg eisini búði, so vit bæði hava verið sum systkin. Ikki hevði tú ta stóru skúlagongd, men tú fórt til Havnar og fekk bæði stýrimans- og skipsførara-prógv. Fór síðani út at sigla, eg minnist hvussu eg gleddi meg hvørja ferð tú kom heim aftur, tí tú hevði altíð gávur við til mín.

Tú giftist við Maluni, og settu tit búgv í Klaksvík. Tit eiga tvær synir, og nú eigur tú trý abbabørn, sum tú gongur sera høgt uppí.

Hesi síðstu árini hevur tú ikki siglt so nógv, men arbeitt á landi.

Góði Gakki, mamma og eg hava nógv at takka tær fyri, alt ið tú hevur verið fyri okkum báðar. Takk fyri gestablídni tá vit eri har norðuri, og tá tit vóru niðri. Tað verður saknur í tykkum nú tit fara til Grønlands, má Harrin styrkja tykkum í arbeiðinum.

Alt tað besta ynski eg tær.

**Systkinabarnið**

# Stuðulskonsert í Eydnuni



*Callarasi-missiónin hevur millum annað útvegað hesum sjúkrahúsinum í býnum Budesti nógva útgerð til røkt og viðgerð av teimum sjúku*

Leygarkvøldið kl. 19 verður skipað fyri eini stuðulskonsert, sum er til frama fyri tað arbeiði sum Callarasi-missiónin ger ímillum fátæk í Rumenien.

Á konsertini fara hesi at luttaka: Sólva Ford, Oasubrøðurnir, Heini Lützen, Oddbjørg, og Jógvan og Hallmar.

Verkætlanin í Rumenien er ein fult út føroysk verkætlan, har ein tey seinastu níggju árini hevur arbeitt millum fólk, sum eru sera illa fyri. Har er smátt við mati, arbeiðsloysið og fátækradømi er stórt.

- Fyri tveimum árum síðan eydnaðist tað okkum at fáa eitt fullfiggjað pumpuanlegg sum gáva frá eini danskari pumpufabrikk. Hetta gjørdi tað gjørligt at fáa tað reina grundvatnið upp, sigur Thomas J. Askham frá Callarasi-missiónini.

Við eini peningagávu frá Føroya Landsstýri varð gjørligt at leggja vatnveiting út til yvir 200 hús. Í sama viðfangi verður streymur lagdur inn í húsini hjá fólki.

Í tí umráðnum har arbeitt verður, eru møguleikarnir hjá teimum ungu sera vánaligir at fáa tær útbúgving ella at lesa víðari. Har hevur stuðul úr Føroyum gjørt tað møguligt at nakrar gentur og dreingir hava kunna lisið víðari.

Ein onnur grein av arbeiðinum er, at fólkið kann koma til arbeiðis við teimum bussunum sum vórðu keyptir brúktir í Danmark.

- Hetta tiltakið hevur verið til gleði fyri mangar familjur, sigur hann.

### Sjúkrahús trongir hjálp

- Tað er við stórari gleði og takksemi sum vit hava møtt, tá vit eru komin við útgerðini. Eg kann trygt siga, at onki privat heim er so illa fyri við seingjarútgerð, tá talan er um løk, dýnur, koddar, dýnubetrekk.

- Stjórin greiddi frá, at seingjarløkini vórðu klipt í fýra petti. og løgd har sum sjúklingurin gjørdi seg vátan, sigur Thomas J. Askham.

Umframt hetta manglaði so mangt annað, køliskáp, gasskomfýrar, eimhettir og fólk at geva eina hjálpandi hond til mangt og hvat.

Annars hevur Callarasi-missiónin kontur í øllum peningastovnunum. Allur peningur fer óskerdur til fólkið í Rumenien.

**sb.**

**Føðingar**

5. apríl fingu Marian S. Dam og Sophus E. Dal Christiansen, Tórshavn ein son, hann var 54 cm langur og vigaði 3650 gr.

9. apríl fingu Hjørdis Bjørk Hjaltadóttir og Jákup Egil Joensen, Froðba, eina dóttur. Hon vigaði 4300 gr. og var 55 cm long.

9. apríl fingu Sanna H. Niclasen og Nick K. Waaben, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

10. apríl fingu Jacobina Eliasen, Hvannasund og Sørin Petersen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

10. apríl fingu Eyð Gudmundsson og Ingi Højgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4450 gr.

12. apríl fingu Marianna á Dul Fríðberg og Bjarni Fríðberg, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

12. apríl fingu Hansa Nicolajsen og Hallur Sólsker, Sandur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

13. apríl fingu Unn og Jógvan Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4450 gr.

13. apríl fingu Katrin Ósá og Poul Jan Niclassen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

13. apríl fingu Annika Fossá og Hans Petur í Brekkunum, Keypmannahavn eina dóttir. Hon vigaði 3670 og var 52 cm long.

15. apríl fingu Valborg Simonsen og Oystein Sørensen, Argir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4850 gr.

15. apríl fingu Rúna Poulsen og Guttormur í Skála, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

**Prógv**

Tann 27. mars hevur Oddjó Stovugarð, Skálavík, lokið prógv í veterinærmedicin - Cand.med.vet. frá Det Biovidenskabelige Fakultet, Københavns Universitet.

Tann 25. januar 2008 tók Helga Johannesen, Kaldbak, løgfrøðiligt embætisprógv, cand. jur., við Lærda háskúlan í Keypmannahavn.

**Brúdleyp**

3. januar 2008 *giftust* Ciellcic Locatelli úr Frankaríki og Jóhannes Mortensen Klaksvík. Í samband við at tey eru heima verður ein hugnaløta í Betesta 19. apríl kl. 15 til 20. Øll eru vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**80 ár**

Tann 9. apríl *fylti* Helga Poulsen, haldbóndi í Innistovu í Kaldbak, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Nazareth í Kaldbak, Dýrabiðidag frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**

**18. apríl. Eleuterius,** biskupur í Illýriu, tikin av døgum um leið ár 200. Dagurin verður eisini skrivaður Elenterius.

**19. apríl. Dánjal**. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Bíbilska navnið merkir Guð er dómari mín.

**20. apríl. Sulpicius**, deyður umleið 1115. Háborin rómverji, sum saman við einum øðrum, Serilianusi, gjørdist kristin; teir vórðu hálshøgdir.

**21. apríl. Florentius.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni. Hesin dagurin er ásettur til minnis um teir allar.